LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 169/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni, um Russar og ukrainar í Føroyum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Eru Føroyar fyrireikaðar til møguligar illstøður millum russar og ukrainar í Føroyum?

2. Hvat hevur landsstýrið gjørt – ella ætlar at gera, fyri at fyribyrgja slíkum støðum?

Svar:

Til spurning 1 og 2
Løgtingið samtykti einmælt tann 7. apríl 2022 uppskotið hjá landsstýrinum um at taka ímóti fólkum riknum úr Ukraina. Hetta er ein varði á vegnum í føroyskari politiskari søgu, tí at hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at landsstýrið alment boðar frá, at Føroyar taka ímóti flóttafólkum. Eg haldi, at sum eitt av heimsins ríkastu samfeløgum, er tað ikki annað enn natúrligt, at Føroyar gera sítt, og at vit opna okkara dyr fyri fólki, ið flýggjar undan ræðiliga krígnum í Ukraina. At vit hjálpa okkara evropeisku grannum.

Nýggju stigini at taka ímóti flóttafólkum krevja sjálvsagt, at vit eru so væl fyrireikaði sum møguligt. Og tað haldi eg eisini at vit eru. Higartil hevur landsstýrið havt eitt gott og tætt samstarv við Reyða Kross Føroya um at taka ímóti ukrainum í Føroyum. Nú gera vit okkum nakrar virðismiklar royndir við bæði at taka í móti flóttafólkum, og vit at tryggja at tey koma so væl inn í føroyska samfelagið sum gjørligt.

Eg havi áður sagt at alment, at hetta fer at krevja nógv av okkum øllum, sum búgva í Føroyum og tað fer at merkjast í bý- og bygdarmyndini, at vit nú fáa fleiri ukrainar til Føroya. Tað er ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum av okkum at tryggja, at tey, sum koma uttanífrá til Føroya, trívast og koma væl inn í føroyska samfelagið. Tað verið seg bæði russar ella ukrainar.

Sambært Hagstovuni búðu 1. januar í ár fólk í Føroyum, sum høvdu ríkisborgaraskap úr 102 ymiskum londum. Summi av hesum londum eru í kríggj við hvørt annað, men tíbetur kenni eg ikki til, at hetta er beinleiðis atvold til illstøður millum fólk í Føroyum. Tað er mær vitandi heldur ikki dømi um at tað hava verið illstøður millum russar og ukrainar í Føroyum. Eg vænti og vóni, heldur ikki at tað verður so. Men skuldi ein tílík illstøða tikið seg upp, so eri eg ikki iva um, at teir røttu myndugleikarnir, eitt nú løgreglan, fer at avgreiða eina slíka støðu, eins og tey vanliga gera í øðrum málum av slíkum slagi.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Í Tinganesi, 29. apríl 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo